29. juni 2011

**Vestnorden Foresight 2030 – 2. stig.**

Verkætlanin Vestnorden Foresight 2030, har Føroya Kommunufelag luttekur í, saman við kommunufeløgunum í Íslandi og Grønlandi, er nú kom væl leiðis.

Byrjað var á lokalum støði, har folk í Sandoynni og Suðuroynni seinasta heyst vóru boðin, at koma við teirra áskoðan á menning í oynni fram til 2030.



Foresight átakið er nú komin á annað stigið, har lokalu tilmælini eru grundarlagið undir einum kjaki við landsmyndugleikar og stovnar um, hvussu økini kunnu mennast frameftir.

Triðja stigið er ein felags verkstova í Íslandi í oktober, har úrslitini frá øllum trimum londunum verða løgd fram.

**Tjóðarverkstova á Hafnia**
Mánadagin 20. juli var sett hol á annað stig á verkstovu á Hotel Hafnia. Innboðin vóru umboð fyri lokaløkini, kommunula geiran, vinnuna, íverksetan, skúlaverkið og altjóða samstarv, at viðgera tilmælini frá lokalu verkstovunum.

Málini frá lokalu verkstovunum fram til 2030 vóru í stuttum:

- At fólkatalið í oyggjunum ikki minkar,
- at tey ungu vilja búseta seg, arbeiða og trívast og
- at lokala fyrisitingin, saman við landsmyndugleikunum, skapar víðar og góðar karmar.

Á verkstovuni komu fleiri áhugaverd uppskot, hvussu hetta kann lata seg gera. Semja var um, at primus motor í eini møguligari menning av oyggjunum verður eitt samstarv ímillum lokalar myndugleikar, kommunurnar, vinnuna og myndugleikar og stovnar undir landinum.

Í samstarvi kunnu fleiri átøk setast í verk, sum munandi kunnu betra um treytirnar hjá lokaløkjunum at menna seg.

Nøkur av teimum verða nevnd her:

*Kommunan og skúlin,  ein hurð til íverksetan*

Breið semja er um, at ein av grundarsteinunum undir menning í økjunum má koma fra lokalari vinnu og íverksetan.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

Fyri at stuðla uppundir hesa mest møguligt er tilmælið, at kommunurnar gerast partur av einum íverksetara netverki, har kommunan gerst hurðin fyri nýggja íverksetan, og kann ávísa ráðgeving og vísa á hølir og stuðulsmøguleikar.

Undirvísing í verksetan eigur at setast á stovn í fólka- og kvøldskúla høpi, so bestu fyritreytirnar og besta vitanin er tøk. Undirvísingin kann skipast sum fjarundirvísning, um netið, har lutakarar runt í øllum landinum kunnu luttaka.

*Fokus á fjararbeiðspláss*

Vinnan og tað almenna eiga í nógv størri mun leggja dent á møguleikan við fjar-arbeiðsplássum.  Á nógvum arbeiðsøkjum, í vinnuni og hjá tí almenna, ber til at hava fjarabeiðspláss, tvs. at ein partur, 40-60 %, av arbeiðsuppgávunum kunnu loysast uttanfyri sjálvt tað fysiska arbeiðsplássið, sum í dag oftast liggur á meginøkinum.

Ber til at brúka ein størri part av arbeiðstíðini í lokaløkinum, er eisini størri møguleiki fyri, at fólk ikki flyta til meginøkið, bert tí krøvini frá arbeiðsgevarum krevur tað.

Arbeitt eigur eisini at vera við, at seta skrivstovfelagsskapir á stovn í lokaløkjunum, har íverksetar og fólk við møguleika fyri fjararbeiðsplássi, kunnu arbeiða og samskifta um nýggj arbeiðsøkir og átøk í økinum.

Kommunurnar, tað almenna og vinnan eiga, í samstarvi, at menna hesar skrivstovu-felagsskapir. T.d. kann kommunan standa fyri hølunum, meðan arbeiðsgevararnir leiga seg inn í skrivstovurnar.

*Eitt gott stað at búgva sum borgari – ein kommuna í oynni*

Kommunurnar eiga í alt størri mun, at arbeiða við at gera lokaløkini til eitt stað har borgarin trívist. Í dag seta borgararnir alt størri krøv til kommunalar tænastur, sum tey gjalda fyri ígjøgnum skattin. Borgarin vil eisini, í størri mun enn fyrr, verða við til at mynda kommununa, verða spurdur eftir og kunna luttaka í lokalum og kommunalum átøkum.

Semja var um, at skulu Samdoyggin og Suðuroyggin klára tær øktu uppgávurnar, sum standast av at menn oynna, eiga kommunurnar í oyggjunum at verða lagdar saman, so ein kommuna verður í Sandoynni og ein í Suðuroynni.

Samanløgdu kommunurnar fáa størri fíggjarliga styrki, at lyfta avbjóðingarnar sum koma. Avgerðirnar um, hvar t.d. ein skrivstovuflagsskapur skal liggja landafrøðiliga í oynni blívur minni relevantur, tá alt verður ein kommuna.

Tað er Føroya Kommunufelag, sum umsitir Vestnorden Foresight 2030 í Føroyum. Ráðgevingarfyritøkan BF-konsult og Sp/f VILT, loysa í felag konkretu uppgávurnar í samband við verkætlanina.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo